# Summarkapping 2008

# Sosialurin í summarhýri




*Starvsfólkini á marknaðardeildini hjá Sosialinum/Rás2,hava samskipað summarkappingina 2008. Aftast á myndini: Gudny Langaard og Joan Abraham. Fremst: Tróndur Skaalum, Henrietta Hammer og Birgir Waag Høgnesen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Summarið nærkast í hvørjum, og Sosialurin skipar fyri eini rimmar summarkapping, har tað ber til at vinna spennandi vinningar, sum tilsamans hava virði uppá eina fjóðrings millión**

Sosialurin fer nú aftur undir eina spennandi summarkapping, sum verður skipað sum eitt puslispæl, har møguleiki verður fyri at vinna ferðir og annað fyri meir enn ein 1/4 millión krónur.

Summarspælið verður skipað sum ein kapping, sum varðar frá 19. mai og 5 vikur framm.

Í Sosialinum í dag liggur eitt puslispæl, sum manglar puntar. Puntarnir verða at finna í Sosialinum frá mánadegnum 19. mai til og við fríggjadagin 20. juni.

Tey, sum ætla sær at taka lut í kappingini, skulu savna allar puntarnar, líma teir á puslispælið og senda tað til Sosialinum. Drigið verður millum tey, sum senda puslispøl til Sosialin.

Fokus á summarið

Sosialurin fer ikki bara at bjóða eina spennandi kapping, har fólk kunnu vinna ferðir her heima og út í heim. Blaðið fer eisini at seta fokus á summarið við greinum og myndum.

Føroyingar gera alt meira burtur úr ferðavinnuni, og Sosialurin fer at kasta ljós á nakað av tí, sum stendur summargestunum í Føroyum í boði.

Eisini tríva vit í okkurt av tí, sum føroyingar kunnu ferðast til úti í heimi.

**Nógvir góðir vinningar**

Eingin kapping uttan góðar vinningar, og her spílar Sosialurin seg út við nógvum spennandi vinningum. Tú kanst sleppa á flog við Atlantsflog og seta kós ímóti Stockholm, sum er eitt nýtt ferðamál hjá flogfelagnum. Tú kanst eisini sleppa til Lalandia í Danmark, sum er eitt framúr feriustað fyri familjuna. Og her heima kanst tú fara á sjóferð við Norðlýsinum, sum ger spennandi og hugtakandi ferðir kring oyggjarnar.

Hetta og nógv meira kann vinnast í rúkandi heitu summarkappingini hjá Sosialinum.

Og so kunnu vit bara ynskja øllum eitt gott summar – og góða eydnu í kappingini.




*Hesin kalendarin er í miðdeplinum í stóru summarkappingini hjá Sosialinum*